


# Katrin Holm • Snarskivufólk • 59 ár

Lýs teg sjálvan við trimum orðum?
Fryntligt, jalig og forvitin

Hvat orð ella hvønn setning nýtir tú oftast?
Eg veit ikki heilt, men eg sigi oftað "Tað veit Gud"

Hvørjum hyggur tú at hjá hinum kyninum?
Eg hyggi at heildini

Hvussu langa tíð nýtir tú at gera teg klára um morgunin?
Ein hálvan tíma - at vaskast og eta

Hvat stressar teg?
Alt sum eg ikki fái gjørt

Hvat gleðir teg?
Lívið

Nær feldi tú seinast eitt tár?
Eg eri so ring at gráta. Men um skal nevna okkurt, so græt eg nógv, tá mamma mín doyði um árskiftið

Nær smakkaði tú tær seinast á?
1. oktober í veitslulag við teimum í gongufelagnum, sum vóru og gingu í Íslandi í summar. Vit høvdu eitt slag av myndakvøldi.

Hvat var seinasta ynski, sum tú fekst uppfylt?
At B36 varð Føroyameistari leygardagin

Hvar arbeiðir tú?
Eg arbeiði í snarskivuni hjá Tórshavnar kommunu. - Eg fáist við borgaratæanstu og umsiting av bíðilistanum til barnaansing

Hvørji ráð hevur tú til fólk, sum ætla sær at arbeiða við borgaratænastu?
At vera fyrikomandi og tolin

Hvat er besta uppfinningin og hví?
Fyri Tórshavnar kommunu er tað Snarskivan, ha, ha, ha - Man hjólið ikki vera besta uppfinningin? Tað fær alt at mala.

Hvat hevur tú í lummunum beint nú?
Lyklar og eina feittstift

Hvat er títt besta heimaráð?
Far út og gakk. - Tað hjálpir fyri alt

Hvør er stuttligast í Føroyum og hví?
Kundi hugsa mær at nevnt onkran forkunnugan. Men eg sleppi ikki uttan um Pipar Og Salt, tí teir fáa øll at flenna og so fer man eisini at hugsa aftan á.

Hvør er keðiligast í Føroyum og hví?
Eg veit slettis ikki hvør, men politikkarar sum heild. Tí teir snakka altíð upp í saman

Hvussu ofta speglar tú tær?
Hvørja ferð eg komi framvið einum spegli

Hvussu ofta ert tú hjá frisør?
Umleið 4 ferðir um árið

Hvør er tín stuttligasta uppliving í starvinum hjá Tórshavnar kommunu?
Eg havi tagnarskyldu um ta stuttligastu. - Men har hava verið nógvar stuttligar, eisini saman við starvsfólkinum eftir arbeiðstíð, t.d. dansikvøldið, vit høvdu herfyri, tað var øgiliga stuttligt.